# Millumskúlaflokkur umleið 1930

## Færøernes Mellem- og Realskole



Mynd í sambandi við framsýningin av millum- og realskúlanæmingum hjá Jórunn Dánjalsdóttir, sum verður um ólavsøkumundið í Kommunuskúlanum.

Hendan myndin er tikin uttan fyri fimleikarhøllina umleið 1930. Genturnar standa við ein træpall.

Vinstrumegin træpallin f. v.: Fía Debes, Birthe Christensen, Vigga Cohr-Nielsen, lærari, og Sólrun Winther (gift Holm).

Aftan fyri træpallinf.v.: Dagny Niclasen (gift Follend), Torbjørg Winther (gift Holm), Lena Nicolajsen (gift Nielsen) og Hanna Reinert (gift í DK).

Høgrumegin træpallin f. v.: Anna (búði í Tórsgøtu), Berghild Breckmann, Mia Weihe, Else Busk (dóttir yvirlærara í realskúlanum) og Arnóra Evensen (gift Bergstedt)

Sitandi á træpallinum, f. v.: Ása Mortensen (gift Vágsheygg) og Lilly Jensen.

Myndamaður var Hessensmith, sum var stjóri í Føroya Banka.

Um onkur veit meira um hesa myndina og t.d. veit hvussu Anna, sum búði í Tórsgøtu, eitur til eftirnavn ella hevur okkurt at viðmerkja, er viðkomandi vælkomin at kontakta Jórunn Dánialsdóttir. Adressan er Sílagøta 3, FO-100 Tórshavn. Tel. 316024 /226024 ella 0045 30 69 77 92.

Realskúlamyndir kunnu latast til Jórunn ella latast "navnmerktar" til Wrangler Shop í N. Finsensgøtu 23 (tel. 314710).

Myndaeigari: Forminnissavnið

# Listasøgulig fyrilestrarøð

TÍÐINDASKRIV

Listasøgulig fyrilestrarøð við Mette Wivel, mag. art.

Føroysk myndlistafólk, Listafelag Føroya og Fróðskaparfelagið fara at skipa fyri eini fyrilestrarøð í trimum pørtum. Fyrilestrahaldari er Mette Wivel, og evnið er: Frá marmor-standmyndum til elektroniska list. Menningar(lista)søga 700 f. Kr. - 2000 e. Kr. Mette Wivel er magistari í listasøgu og hevur hildið ofta hetta væl umtókta skeið.

Fyrilestrarøðin fer at geva grundleggjandi fatan av evropeiskari myndlistasøgu. Við menningini hjá einstaka listafólkinum í huga fer Mette Wivel at viðgera málningalist, skulptur og byggilist. Hvørt tíðarskeið verður lýst við støði í list og listafólki, sum á serligan hátt hava verið við til at skapa nýggja hevd og nýggj listalig rák.

Fyrilestrahaldarin fer at seta -ismur og tí ðarskeið í ein samfelagsligan samanhang. Harumframt spyr hon: Hví sær listin soleiðis og/ella soleiðis út í hesum og hasum tíðarskeiðinum? Somuleiðis fer hon at seta einstaklingar, sum hava havt ein avgerandi søguligan leiklut fyri menningina av samfelagnum, í brennidepilin. Fakligi heiti, tøkni, ikonografi (læran um symbol) og myndamál sum heild verða greidd og greinað.

Fyrilestrarøðin fevnir um trý vikuskifti, tað fyrsta verður í heyst, tann 15. og 16. september 2007 báðar dagarnar kl. 10-16.

Fyrsta vikuskiftið: Frá fornøld til renæssansu, 700 f.Kr.- 15. øld: 15. og 16. september kl. 10. - 16. Annað vikuskiftið: Frá italskari renesansu til postimpressionismu, 1400 - 19. øld. Triðja vikuskiftið: Frá kubismu til videolist (1900 – 2007).

Fyrilestrarøðin er almenn, men tað er neyðugt at tekna seg. Til ber at tekna seg til eitt vikuskifti í senn og at seta seg fyri øll trý vikuskiftini beinanvegin. Hvørt sær kosta vikuskiftini 375 kr. Tey, sum tekna seg til øll trý í senn, fáa tey fyri 900 kr.

Tekningin fer fram við at rinda 375 kr fyri vikuskiftið 15.-16. september 2007 (900 kr. fyri alt skeiðið) á konto (6460) 158.506.3 í Føroya Banka hjá felagnum Føroysk Myndlistafólk

Enn er ikki avgjørt nær annar og triði partur av fyrilestrarøðini verða, men tað verður lýst í góðari tíð. Tað eru Føroysk Myndlistafólk, Listafelag Føroya og Fróðskaparfelagið sum skipa fyri fyrilestrunum.



*Forhæng til indgangsdør*

*Foto: Jørgen Wolek*

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá ið kæri maður, pápi, verpápi, abbi og bróðir okkara

**Elmar Joensen**
av Skála

andaðist og varð jarðaður.
Vit takka Jógvan Fríðriksson fyri troystarrík orð í heimi og kirkju. Takk til kirkjutænarar, sangarar og til tykkum øll, ið hjálptu so væl til við ervinum.
Somuleiðis takk fyri, tit á Hotell Tórshavn, fyri góða hjálp. Øssur Berghamar fyri vitjan á Ríkishospitalinum, og heilsusystrarnar, her heima, fyri stóra hjálp.
Takk fyri blómur, kransar og peningagávur.
Takk til tykkum øll, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Vegna familjuna*
**Fríðgerð, Jantórur, Magni og Maud**

## Tøkk

Hjartalig øllum sum á ein ella annan hátt sýndu samkenslu, tá kæri sonur, pápi og abbi okkara

**Arni Jespersen**
Tvøroyri

andaðist og varð jarðaður.
Tøkk til familju og vinir, og ein serstøk tøkk til øll í Salem, ið hjálptu til við jarðarferðina og ervið.
Tøkk fyri heilsanir, blómur og kransar og peningagávur, og tit, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Vegna familjuna*
**Mamma, Heðin og Hallur**